# Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð
# Bygdarráðsfundur tann 27. oktober 2009, kl. $19^{00}$

**Bygdarráðslimir á fundi:** Karl A. Olsen, Herit Magnussen, Pauli T. Petersen, Jón Mikkelsen Evelyn Gaard, Siri S. Niclassen og Bárður Poulsen
**Skrivari:** Maud Poulsen

---

Vísandi til grein 18, stk. 2, í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri hevur Evelyn Gaard boðað frá, at henni berst frá møta á fundinum, og at tiltakslimur fær fundarboð í hennara stað.

Tiltakslimurin Sóleyð Poulsen hevur munnligt tann 20. oktober 2009 fingið fundarboð.

Sambært grein 18, stk. 3, í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri, skal kommunustýrið gera av, um treytirnar fyri innkalling av tiltakslimi eru loknar.

Bygdarráðið samtykti einmælt at góðkenna innkallingina av Sóleyð Poulsen sum tiltakslimur.

Til viðgerðar fyri **opnari hurð**:

**Mál 49**
Tilmæli frá Teknisku nevnd um umsókn frá Annfinn Garðalíð um sundurbýti av matr. nr. 143a.
J.nr. 2005-755

**Viðv. 49**
Tilmælið einmælt samtykt.

**Mál 50**
2. viðgerð av fundarskipan fyri Vestmanna Bygdarráð
J.nr. 2009-188

**Viðv. 50**
Fundarskipanin einmælt samtykt.

**Mál 51**
2. viðgerð av stýrisskipan fyri Ferðslunevndina hjá Vestmanna Kommunu
J.nr. 2009-188

**Viðv. 51**
Stýrisskipanin fyri Ferðslunevndina einmælt samtykt.

**Mál 52**
Kunning um kommunuálitið

**Viðv. 52**
Borgarstjórin handaði bygdarráðnum hvør sítt eintak av samandráttinum av kommunuálitinum, og kunnaði um málið.

Bókin lisin. Fundur lokin kl. 20.00.

Sign.:

Karl A. Olsen Herit Magnussen Pauli T. Petersen Jón Mikkelsen

Sóleyð Poulsen Siri S. Niclassen Bárður Poulsen